Hví ikki stuðul til ull?

Hetta sigur Borgný Patursson, sum var ein av teimum fýra sniðgevunum, sum sýndi fram, tá Listastevnan varð sett. Hóast ikki blaðung, hevur hon nomið sær kunnleika á skúla í Danmark og fekk allar bestu viðmæli. M.a. gekk toppmedellið Oliver Bjerrehus í klæðum frá henni

listastevna føroya 2001

Dagfinn Olsen

Í Kirkjubø situr ein sniðgevi, sum ikki blaðung fór á skúlabonk, og sum nú, 2 ár seinni, taldist millum tær fýra, ið sýndi fram, tá Listastevnan varð sett.

Borgný Dam Patursson hevur júst lokið 2 ára útbúgving á Københavns Mode- og Designskole. Hóast ikki blaðung, so var felagsskapurin við tey ungu eingin trupulleiki, sigur Borgný.

Til endaligu framførsluna gekk toppmodellin frá New Yourk, Oliver Bjerrehus í klæðum frá henni, tí honum dámdi tey so væl.

Borgný fekk bestu viðmæli, m.a. tí, at hon sjálv hevur sett saman, gjørt hvørt plagg sjálv og har umframt skapt eitt nýtt slag av klæði. Hon arbeiðir núr við gaze, sum hon vevur seyðaskinn ímillum

Borgný sigur, at hon hevur altíð vevað og bundið. Hon hevur verið á ymsum skúlum. Tá hon á sinni flutti til Føroya, eftir 18 ár í Danmark, fann hon einki at búgva í í Havn, men fór til Fugloyar. Har lærdi hon um ull og at nýta hesa. Hon hevði síðani framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har alt varð selt.

Borgný heldur, at nógvir møguleikar eru í Føroyum, tí hetta verður mett sum lítið, og unikt land.

Eisini eru føroyingar so glaðir og takksamir, tá onkur ger okkurt úr føroyskum tilfari. Slíkur poistivur andi er við til at skapa áhuga og dirvi at halda fram við slíkum arbeiði, metir Borgný, ið fegnast um, at føroyingar soleiðis stuðla hvønn annan.

Dýr marknaðarføring

Borgný er nú heima aftur í Kirkjubø og skal nú í gongd við at geva snið, framleiða, selja og annars alt, ið hoyrir til, tá ein ætlar sær at liva sum designari.

Men eittnú marknaðarføring er dýr. Til sýningina, tey gjørdu á skúlanum, savnaðu tey eini 100.000 krónur. Stuðul fekst eingin úr Føroyum, viðmerkir Borgný.

Tað, ið Borgný fæst við, er eksklusivt design, tað vil siga av dýrara slagnum. Hetta er eingin loyna.

Málið hjá Borgný er at koma í t.d. Bellacentrið og yvirhøvur at koma út um landoddarnar og koma fram har og gera Føroyar kendar har.

– Eg má hava ferð á, eg havi ikki stundir at bíða. Onnur siga við meg, at tey bnú ætla á pensjón, men eg vóni at arbeiða eini 10 - 20 ár afturat, smílist Bogný Patursson.

Hon vísir á mongu møguleikarnar við heimasíðum og øðrum.

Hon heldur, at ofta verður føroyskt handverk ov lítið nógv eru av hvørjum slag.

– Klæðir av sama slag kosta aðrastaðni, t.d. Finnlandi, eini 7 - 8000 krónur. Vit kunnu gera hetta líka gott, sigur Borgný og metir, at eitt sindur av politiskari vælvild má til.

– Stuðul verður givin til so nógv, t.d. mjólk. Hví ikki til ull?, spyr Borgný, ið væl skilir bøndur, ið ikki tíma at fáast við seyðaskinn, tá einki fæst fyri tey.

– Vit høvdu lutafelagið Skinn. Men tað kostaði okkum meira at garva í Føroyum, enn at senda eina bingju av landinum til Svoríkis. Tá er ikki alt rætt, heldur Borgný, ið heldur, at okkurt verða endavendir, eins og snotuligu pløggini á borðinum, og metingar og hugskot tróta ikki.

– Í Noreg hava t.d. flogternurnar serligar uniformar. Hví ikki gera tað sama her hjá okkum, í staðin fyri tað vanliga, keðiliga, sigur Borgný, sum saman við hinum fýra sniðgevunum nú skal kring landið við Listastevnu Føroya at sýna fram.

Og áhugin er stórur fyri pløggunum og Borgný hevur nú samband við fólk í t.d. Noreg, ið leggja seg eftir eksklusivum designi.

Hóast ikki blaðung, er Borgný júst komin av skúlabonki á designskúla og hon ætlar sær at dríva á so leingi hon kann, tí áhugin er stórur fyri pløggum, ið hon letur úr hondum

Ætlanir

Fyri framman fyri designaran í Kirkjubø, liggur ein framtíð, ið hon sær í ljósinum av arbeiði og annars ferðum.

Sniðgevar arbeiða við tí, ið skal koma um eitt ár, so tað hevur týdning at fylgja við í, hvat hendir á økinum.

Prátið gongur í Kirkjubø, har ein troyttur sniðgevi greiðir frá, eftir dagsins sýning. Ætlanir og møguleikar sama.

– Nú er eftir hjá okkum at stovna eitt felag, sigur Borgný.

Hanus vann

Vinnarin av stuttsøgukappingini í samband við Listasetvnu Føroya gjørdist Hanus Kamban

Dagfinn Olsen

Hanus Kamban vann við søguni Angels Place. Dómsnevndin segði m.a. í grundgevingini, at søgan skaraði framúr í frásøgukynstri. Hetta er søga um Liselott, sum er í Keypmannahavn. Lesarin fær at vita um fortíðina, við at telefonin ringir og boðini eru andlát heima, tað er á bygd í Føroyum.

14 søgur, av teimum 42 innkomnu handritunum, eru komnar út í bókini Mjørki í Heilum, sum Bókadeild Føroya Lærarafelag gevur út.



Mjørki í heilum

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út stuttsøgusavnið Mjørki í heilum, ið er stuttsøgusavn við søgum, ið eru valdar út millum tær 42 til stuttsøgukapping hjá Listastevnu Føroya

TÍÐINDASKRIV

Í savninum eru 14 stuttsøgur, ið 12 rithøvundar og ein kvøldskúlaflokkur á skriviskeiði hava skrivað. Søgurnar eru valdar út millum tær 42, sum komu inn, tá ið Listastevna Føroya 2001 skrivaði út stuttsøgukapping.

Søgan, sum vann 1. virðisløn, »Angels place«, eftir Hanus Kamban, er prentað fremst í savninum, men annars er raðfylgjan tilvildarlig. Søgurnar, og tey, ið skrivað hava, eru:

Niclas Rasmussen: »Fyri lív, eftir deyða«.
Marjun Kjelnæs: »Kópakona«.
Dagfinn Olsen: »Oktober í kjallaranum«.
Oddvør Johansen: »Gott er at vera sterkur Maria og Tann nútíðin, vit elska at skriva um«.
Elias Askham: »Placebo«.
Sólvør Patursson Niclasen: »Glerpípusonatan«.
Halldóra Dam: »Húsini«.
Rachel Helmsdal: »Angi av Ribes«.
Kvøldskúlaflokkur: »Út í tóman heim«.
Meinhard Jensen: »Login í hellinum undir kaffistovuni«.
Heidi Laura Vágsá: »www.kærleiki.fo«.

Søgurnar eru ógvuliga fjølbroyttar, bæði í innihaldi og skrivingarlagi, og uttan at greiða frá innihaldinum kann nevnast, at umframt spennandi nútíðarsøgur eru í savninum bæði sience-fiction, ræðusøga og kjattsøga, sum á sín hátt eisini siga nakað um Føroyar fyrst í 21. øld.

Fremst í bókini er stutt formæli, sum formaður í stjórn Listastevnu Føroya 2001, Helga Hjörvar, hevur skrivað. Aftast er prentað rithøvundayvirlit við stuttari umrøðu av rithøvundunum.

Listamaðurin Ova hevur gjørt permuna. Hann hevur, sum ein av fáum, lisið handritið, og hann eigur eisini uppskotið til heitið á savninum: »Mjørki í heilum«.

Stuttsøgusavnið »Mjørki í heilum« 194 bls., heft við klaffum. Hestprent hevur umbrotið og prentað bókina, Helge Justinussen hevur bundið inn. Bókin kostar kr. 150 í bókhandlum kring landið.

Amilo fartelda

Intel Pentium III 800 MHz Geril • 128 MB RAM • 10 GB Harðdisk • 8 x DVD • Disklastað • 14.1" TFT-XGA Skerm • Silicon Motion Lynx3DM 8 MB Grafikkort • 56K V.90 Modem • Infrareytt samband Fast IrDa 1.1 • Windows ME DK • MS Works 2000 • 1 ára garanti

Kr. 19.985,-

FUJITSU SIEMENS

FÍGGING, DØMI:
Útgjald: 6.662
Rest yvir 12 mór.: 1.228 um. mán.
Rest yvir 18 mór.: 851 um. mán.

Í samstarvi við: formula.fo fæst øll neyðug service

3 ár ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivent.fo

Løgmaður ávarar ímóti skipaðum ágangi

Anfinn Kallsberg tók í gjár eitt óvanligt stig, tá hann sendi út eina ávaring ímóti boðskapinum í einum teldubrævi, sum fólk í felagsskapinum Hesuferð hevði sent ávísum persónum í Føroyum

ÁGANGUR

Eyðun Klakstein

Fyrrapartin í gjár sendi Anfinn Kallsberg, løgmaður, út eina óvanliga ávaring um nakað, sum hann kallar skipaðan ágang ímóti sær.

Orsøkin til stigið hjá løgmanni var eitt teldubræv frá einum av oddafólkunum í felagsskapinum Hesuferð, sum var sent ávísum persónum í Føroyum. Hesuferð er felagsskapur, sum vil hava føroyskt fullveldi.

Í teldubrævinum verður lagt upp til, at Hesuferð skal mótmæla, »at løgmaður áhaldandi roynir at billa fólki inn, at vit enn eiga at samráðast við donsku stjórnina um tey mál, sum løgtingið hevur sett fyri sjálvstýrisgongdini.«

Skotið verður upp, at hetta skal mótmælast við greiðari grundgeving til eitthvørt høvi.

Í teldubrævinum verður eisini skotið upp, at fólk í Hesuferð fara at gera viðmerkingar í bløðunum, soleiðis sum tey áður hava gjørt.

Brævaskrivarin bjóðar seg fram til at skriva viðmerkingar, sum fólk síðani »kunnu taka at sær, umskriva og senda bløðunum.«

Endar við ruðuleika

Anfinn Kallsberg fekk í gjár hendur á hesum teldubrævi, sum av óvart var sent nógv fleiri fólki, enn tað helst varð ætlað í fyrstu syftu.

Og løgmaður tók beinanvegin stig til at steðga ætlanini í teldubrævinum.

– Sum løgmaður vil eg ávara ímóti tí virksemi, ið sýnist hava tikið seg upp. Serliga er tað ætlanin við skipaðum ágangi ímóti løgmansins samráðingarvilja.

– Besti háttur at loysa ósemjur er at tosa saman. Alt annað endar í ruðuleika, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg heitir í sínum skrivi á fólk um at vísa sømuligan atburð og síggja burtur frá slíkum teldubrøvum, tí hann heldur, at tað kann forkoma skipaðu sjálvstýristilgongdini.

Góðu tit,

Eg hefti við røðuna eg helt á fólkafundinum á Ólavsøku.
Kann eg koma við tveimum uppskotum?
1. At vit aftur fara at gera viðmerkingar við persónligum lesarabrøvum, sum vit gjørdu fram til summarið 2000.
Eg geri gjarna uppskot til innhald í lesarabrøv, sum fólk kunnu taka at sær, umskriva og senda bløðunum. Í hesum sambandi hevur Hesuferð tørv á **talsmonnum og kvinnum**, sum stíga fram og royna at halda sjálvsstýrismálið burtur úr vaksandi valstríðnum til eitt komandi fólkatings- ella løgtingsval
2. At hesuferð mótmælir, at løgmaður áhaldandi roynir at billa fólki inn at vit enn eiga at samráðast við donsku stjórnina um tey mál sum løgtingið hevur sett fyri sjálvstýrisgongdini. Serliga at hann tekur hendan spurning fram í september á einum av teimum heilt einkisigandi "ríkisfundunum". Hettta eigur at vera gjørt við greiðari grundgeving og við eitthvørt høvi.

Lat meg frætta hvat tit halda.
blíðar kvøður
Kjartan Hoydal

Hesin telduposturin frá oddafólki í felagsskapinum Hesuferð fekk í gjár ilt í løgmann, sum sendi út eina almenna ávaring ímóti ætlaninum hjá felagsskapinum

Fiskidagatalið má minka

– Við høgum oljuprísi og høgum rakstarútreiðslum sum heild er meira neyðugt nú enn nakrantíð, at veiðan fyri hvønn fiskidag verður so góð sum gjørligt. Tað er ikki talið á fiskidøgum, sum er mest umráðandi, men heldur góð veiða, teir dagar fiskað verður, siga Henrik Old og Dan Reinert Petersen

Tað er umráðandi, at fiskidagatalið minkar, so hvørt sum veiðitrýstið økist, halda umboð fyri Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin í Vinnunevndini

FISKISKAPUR

Eyðun Klakstein

Skal fiskidagaskipanini verða lív laga, so er neyðugt alla tíðina at taka hædd fyri møguligum øktum veiðitrýsti, ið stendst av endurnýgging til meira effektiv skip.

Tað siga Henrik Old úr Javnaðarflokkinum og Dan Reinert Petersen úr Tjóðveldisflokkinum í viðmerkingum til uppskotið um vinnuligan fiskiskap, sum fær 2. viðgerð í løgtinginum í dag.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, skjýtur upp, at fiskidagatalið verður tað sama komandi ár, sum tað hevur verið í ár.

Hetta hevur landsstýrismaðurin gjørt eftir at hava fingið fleiri tilmæli, og líkt er til, at uppskotið hjá Jørgeni Niclasen fær undirtøku í løgtinginum.

Vinna gjalda

Henrik Old og Dan Reinert Petersen halda, at fiskidagaskipanin er besti háttur at stýra fiskiskapinum undir Føroyum við, men tað er neyðugt at gera neyðugu broytingarnar, skal skipanin kunna halda fram, halda teir báðir.

– Tá ein stórri útskifting í flotanum fer í gongd, verður neyðugt at minka um veiðutrýstið samstundis, og ein møguleiki hevði verið, at vinnan sjálv var við til at goldið fyri, at fiskidagar verða keyptir út úr skipanini, soleiðis at teir, ið eftir eru, fáa betri veiðumøguleikar og umstøður sum heild, siga Henrik Old og Dan Reinert Petersen.

– Við høgum oljuprísi og høgum rakstarútreiðslum sum heild er meira neyðugt nú enn nakrantíð, at veiðan fyri hvønn fiskidag verður so góð sum gjørligt. Tað er ikki talið á fiskidøgum, sum er mest umráðandi, men heldur góð veiða, teir dagar fiskað verður.

Tí halda teir báðir limirnir í Vinnunevndini hjá løgtinginum, at fiskidagatalið verður regulerað, so hvørt sum veiðitrýstið økist.

ROYN HENDAN SERA VÆLUMTØKTA BILIN

KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familja - Camping - Ferðalívur og "mini-busur"

Fest eisini sum vevvagur

Multibilurin til einhvørja loysn

D. B. Bilar
J. Brandsgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 510806